# Dr. Jacobsens-gøta í Havn í 1956

Í sambandi við at Birgar Johannessen leitar fram gamlar havnarmyndir, kemur hann ofta fram á nógvar góðar myndir, sum t.d. hendan, ið er tikin í Dr. Jacobsensgøtu í 1956.

Húsini vinstrumegin í gøtuni eru f.v. tey hjá Magnus S. Simonsen, síðan eru húsini hjá Niels Juul Nielsen, ið her verða lyft eina hædd upp, síðan kemur Keypssamtøkan og Talvhúsið kemur undan.

Høgrumegin á myndini eru húsini, har danin Einar Storr byrjaði við heilsølu í 1956.

Bilurin er ein Ford Fairlane hjá Johannes Berg, Fø 130, grønur við hvítum taki.



*Mynd úr Dr. Jacobsensgøtu í 1956. Leggið til merkis, at ongar gongubreytir eru gjørdar*

*Mynd Føroya Fornminnissavn*

**Brúdleyp**

Mikudagin 18. mai *giftust* á ráðhúsinum í Hvidovre Birgit Hentze, ættað úr Tórshavn, og Claus Ovel-Jensen, Keypmannahavn. Brúdleypsaddressa er: Vedbyholm 36, 2650 Hvidovre.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Hjalgrím Sofus Magnussen**

Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 2. hvítusunnudag, 79 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 20. mai kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Helga**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ein hvønn hátt gjørdu mær 75 ára føðingardagin 21. apríl ógloymandi.
Takk fyri vitjanir bæði á degnum og aftaná.
Takk fyri gávur, blómur, fjarrit, brøv og kort og heilsanir annars.
Tøkk til konu og børn, sum á ein serligan hátt gjørdu dagin hugnaligan og minnisríkan.

Guð signi og styrki okkum øll

**Bestu heilsanir**
**Martin Hammer, Nes**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Móttøka

Í samband við at tað eru 40 ár síðani Fróðskaparsetur Føroya varð stovnað, verður almenn móttøka á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni fríggjadagin 20. mai kl. 15.-17.

**Fróðskaparsetri**

**Dagurin**

**19. mai. Potentiana.** Rómversk genta, sum 16 ára gomul varð tikin av døgum í Róm.